Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Undirskrivað avtala við Danmark og Grønland um uttanríkis-, verju- og trygdarpolitikk

Spurningar:

1. Við hvørjari heimild hevur løgmaður undirskrivað eina avtalu við donsku og grønlendsku stjórnina um at viðgera uttanríkispolitikk, verju-, og trygdarpolitikk í einum ráði við donskum, føroyskum og grønlendskum ráðharrum?

2. Við hvørjari heimild hevur løgmaður skrivað undir avtalu, har eisini yvirtikin málsøki skulu viðgerast í einum slíkum ráði?

3. Nær hevur løgmaður verið til ráðførslu í Uttanlandsnevnd Løgtingsins um hesa avtalu sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya §54?

4. Um ikki, er hetta tá í samsvari við løgtingslóg um stýrisskipan Føroya?

Viðmerkingar:
Danska forsætismálaráðið kunngjørdi tann 4. oktober 2021, at løgmaður hevði undirskrivað eina avtalu um, at danskir, føroyskir og grønlendskir ráðharrar skuldu ganga saman í eitt ráð, har uttanríkispolitikkur, verju-, og trygdarpolitikkur skal viðgerast í felag – eisini á yvirtiknum málsøkjum.

Stýrisskipanarlógin ásetur:
§54.Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning.
Stk. 2. *Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.*

Tí verður spurt, hvussu hetta kann bera til.

Á Løgtingi, 6. oktober 2021

Høgni Hoydal